Sum fráboðað, verður

fyrsti felags foreldrafundur

# í Nólsoyar skúla

mánakvøldið 8. sept. 2008

kl. 19:30 til 21:30

- *inngongdin niðanfyri verður nýtt* -

www.skulin.fo/NOL

nolsoy@skulin.fo

tlf. 217001

Vælkomin ☺

# Skrá:

- ☯ Vælkomin
- ☯ Ársfrágreiðing frá skúlastýrinum
- ☯ Foreldraumboð til yngra bólkin og eldra bólkin
- ☯ Ársætlan, heimaarbeiði o.a.
- ☯ Kunning um skipan (tímatalvur, fríløtur…)
- ☯ KT: Heimasíða, FirstClass, vikuseðlar, samskifti, fráboðanir
- ☯ Samstarv við Látrið
- ☯ Ymiskt

"Borðreitt" verður við kaffi/te og kaku ☺

**Heimasíðan** – www.skulin.fo/NOL er júst løgd til rættis, og verður útbygd eftir orku og tørvi. Fyrst og fremst er hetta ætlað til skjóta og greiða kunning, og sum liður í samskiftinum millum heim og skúla.

**Tímatalvan** er løgd til rættis soleiðis, at øll undirvísing byrjar kl. 8:00. Næmingarnir fara ikki inn í stovuna undan læraranum, men hava fyrst á morgni møguleika at lesa bøkur og tekna - og fáa jakka, skógvar og mateskju á rætt pláss.

**Matpakkaskipan/fríløtuskipan**
Fyrsta fríløtan er til morgunsang, lítlan matpakka og úti-spæl. Næsta fríløtan er býtt í helvt: 15 min. at eta inni, 15 min. úti-spæl. Triðja fríløtan er bert til útispæl í 15 min.

**Ítrótt** - børnini í yngra bólki møta í klæðum, ið hóska til fimleik, ella tey skifta í fimleikaklæði í skúlanum (sjálvi). Børnini í eldra bólki skulu møta í ítróttarklæðum, og hava skógvar/jakka við, ið tey kunnu nýta uttandura (t.d. tá ið runnið verður).

**FirstClass:** Hetta skúlaárið og frameftir, fara vit í stóran mun at samskifta umvegis FirstClass. Tí fáa foreldrini brúkaranavn og loyniorð til FirstClass skipanina - eisini so vit í felag kunnu læra børnini at fara væl um teldupostin. Seinni verður – um neyðugt – møguleiki hjá barninum at broyta loyniorð og harvið "eiga teldupostin í frið".

**Fráboðan** – møtir barnið ikki í skúla, ynskja vit, at tit boða frá t.d. við at sms'a/ringja á tlf. 217001. Eisini ber til at skriva til felags teldupost læraranna nolsoy@skulin.fo.

**Skúlin, partur av felagslívinum** – arbeitt verður við at skipa samstarv millum skúlabókasavnið og Býarbókasavnið. Harafturat er ynskiligt at fimleikahøllin verður nógv nýtt, soleiðis, at skúlin - bæði við bókasavni og ítróttarligum møguleikum – verður týðandi partur í felagslívinum í Nólsoy.

**Ársætlan** - niðanfyri eru nøkur tiltøk í 2008/09:

| | | |
|---|---|---|
| August | 18/8 | Skúlabyrjan |
| September | 08/9<br>v37 | Fyrsti felagsfundur<br>Evnisarbeiði – eisini í samráð við Látrið |
| Oktober | v41<br>*10/10* | Viðtalur<br>Rennidagur í felag við SSS-skúlarnar |
| November | 29/11 | Jólaklipp: Næmingar og foreldur |
| Desember | 13/12<br>17/12 | Jólahald<br>Jólaguðstænasta |
| Januar | v5 | Flokshugnakvøld |
| Februar | v7<br>23/2 | Verkætlan<br>Føstulávintshald |
| Mars | v14 | Páskaevni |
| Apríl | v18 | Viðtalur |
| Mai | 27-28/5 | Seturskúli |
| Juni | *8/6* | Ítróttardagur í felag við SSS-skúlarnar |

Jólahaldið og leygardagsskúli hava við sær, at frídagur verður aðrastaðni í skúlaárinum – og verða tit kunnað nærri um hetta seinni.

**Rundskriv um frítíð og frídagar í fólkaskúlanum skúlaárið 2008/2009**

| | |
|---|---|
| Summarfrítíð: | fríggjadagin 27. juni – sunnudagin 17. august |
| Heystfrítíð: | leygardagin 11. oktober - sunnudagin 19. oktober |
| Jólafrítíð: | leygardagin 20. desember - sunnudagin 4. januar |
| Páskafrítíð: | leygardagin 4. apríl - mánadagin 13. apríl |
| Dýri Biðidagur: | fríggjadagin 8. mai |
| Kr. Himmalsf.dg.: | hósdagin 21. mai |
| Hvítusunnufrítíð: | leygardagin 30. mai - mánadagin 1. juni |
| Grundlógardagur | fríggjadagin 5. juni |
| Summarfrítíð: | fríggjadagin 26. juni – sunnudagin 16. august |
| Skúlafrídagurin | fríggjadagin 22. mai |

Allir nevndu dagar vera roknaðir sum frídagar.

**Landsroyndirnar í 4. flokki**
eru mánadagin 25. mai og týsdagin 26. mai 2009.
**Landsroyndirnar í 6. flokki**
byrja mikudagin 27. mai og enda fríggjadagin 29. mai 2009.